# Coolio til Føroya

**Í oktobermánaði verður Høllin á Hálsi karmur um eina spennandi konsert, tá ið rapparin Coolio og dancestjørnan Crystal Waters fara á pall**

TÓNLEIKATÍÐINDI
*Petur Háberg*
*petur@tpost.fo*

Hóast nøvnini Coolio og Crystal Waters kundu leitt tankarnar til kulda og still vøtn, so verður tað uttan iva heitt og hart í Høllini á Hálsi, tá ið hesi bæði fara á pall við búrkroppa-rappi og pumpandi dance-rútmum.




*Coolio gjørdi av álvara um seg í 90'unum við lagnum 'Gangsta Paradise', ið hittaði stórt kring heimin. So stórt var lagið, at okkara egni Johan í Kollafirði umsetti tað hegnisliga til føroyskt við heitinum 'Grønjakkar', sum somuleiðis hittaði stórt her á landi*

### Eitt búrkroppa-paradís

Artis Leon Ivey, Jr, sum er dreingjanavnið handan Coolio, gjørdist av álvara kendur í 1995, tá ið hann, saman við gospelsangaranum L.V., rappaði um vánaligu korini í amerikonsku ghetto'unum á lagnum 'Gangsta Paradise'.

Lagið gjørdist størsta hittið hjá Coolio higartil og lá ovarliga á flestu hittlistum kring heimin. 'Gangsta Paradise' var fyrsta rapp-lagið, ið náddi eitt fyrsta pláss á enska hittlistanum, og samstundis sat tað longst á ovastu rók á hesum sama lista í 1995.

Vælumtókti filmurin 'Dangerous Minds', við Michelle Pfeiffer í leiklutinum sum seig lærarinna, hevði 'Gangsta Paradise' á síni soundtrack og gav Coolio enn meiri vind í seglini.

### Skjótt 30 mió

Hóast 'Gangsta Paradise' avgjørt er kendasta lagið hjá rapparanum, so hevur hann eisini onnur kend løg við sær í skjáttuni.

Eitt av teimum er pena lagið 'C U When U Get There', ið byggir á eitt tónleikastykki, sum týski komponisturin Johann Pachebel skrivaði fyri skjótt trý hundrað árum síðani.

Seinastu árini hevur Coolio ikki gjørt so nógv um seg, og kemur hetta millum annað av, at hann hevur verið í rættinum fyri at liggja inni við vápnum og rúsevnum.

Men fyri stuttum kom gongd íaftur, og hann hittaði við lagnum 'Gangsta Walk'. Hetta við góðari hjálp frá Snoop Dogg, ið eftir øllum at døma ger alt, hann nertir við í løtuni, til gull.

Higartil hevur Coolio selt yvir 27 mió. fløgur kring heimin.

### Crystal Waters

Sama kvøld fer amerikanska songkvinnan Crystal Waters at framføra. Hon er serliga kend fyri lagið 'Gypsy Woman', ið hittaði stórt fyrst í 90'unum.

Nú er hon aftur við lagnum 'Destination Calabria' saman við italska DJ'inum Alex Gaudino. Hetta lagið lá ovast á danska dance-hittlistanum fyri stuttum.

Atgongumerkjasølan byrjar um miðan september, og hvørt atgongumerki fer væntandi at kosta uml. 350 kr.

---

## Veronika og Kristian í Listasavninum á Sandi

**Estlendska songkvinnan Veronika Portsmuth spældi í gjárkvøldið í Miðlahúsinum í Vágsbotni saman við Yggdrasil. Sunnudagin gongur leiðin suður til Sands, har hon og Kristian Blak fara at spæla í Listasavninum**

TÍÐINDASKRIV

27 ára gamla Veronika er útbúgvin klassikur sangari og orkesturleiðari úr Estlandi. Veronika vitjar í hesum døgum í Føroyum. Hon hevur fingið eina starvsløn fyri í fýra vikur at seta seg inn í tónleikaumhvørvið her og at knýta enn fleiri mentanarbond millum Føroyar og Estland.

Á konsertini í gjár spældi Yggdrasil estisk fólkaløg, løg, ið Veronika hevur skivað á ferð síni í Føroyum og sum hon nevnir Faroese Songbook, okkurt grønlendskt lag, okkurt íslendskt lag og eitt geronimo lag. Sambært Kristiani Blak, so verður nakað tað sama á skránni á Sandi. Men kanska eitt sindur meira av Veroniku acapella. Kristian Blak, ið man hava spælt í nærum øllum hølum í húsa tónleikatiltøkum í Føroyum, sigur, at hann gleðir seg til at sleppa at spæla í Listasavninum á Sandi, har hann ongantíð hevur verið inni áður.

- Vit skipaðu fyri onkrum konsertum har í sambandi við Summartónar, og eg havi frætt at akkustikkurin er sera góður í Listasavninum, sigur Kristian. Konsertin verður kl. 16 sunnudagin, og atgongd kostar kr. 50

---

## Enni og Enni í Vági

**Leygarkvøldið spæla Brandur og Tróndur Enni í Stóra Pakkhúsi í Vági**

TÓNLEIKUR
*Finnur Jensen*
*finnur@sosialurin.fo*

Brandur Enni, sum fyrr í summar hevði eina framúr góða framførslu á Jóansøkufestivalinum, fer leygarkvøldið at spæla saman við eldra beiggjanum Tróndi í Stóra Pakkhúsi í Vági. Brandur Enni syngur og spælir gittar, meðan Tróndur spælir bass og syngur kór.

---

# Folsýra forðar bróstkrabba

**Kvinnur, sum eta nógva folsýru, millum annað er í frukt, grønmeti og fullkorn, eru í minni vanda fyri at fáa bróstkrabba**

NÝGGJ KANNING
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*



Ein nýggj svensk kanning staðfestir nú, at kvinnur ið eta nógva folsýru, sum er í B-vitamin, eru í minni vanda fyri at fáa bróstkrabba.

Kanningin stendur at lesa í American Journal of Clinical Nutrition. Granskarar hava fylt 12.000 kvinnum í Malmø ígjøgnum 10 ár, harav 392 teirra fingu bróstkrabba í tíðarskeiðinum, sigur DR.

Sambært kanningini ótu 2280 av kvinnunum nógva folsýru, og vóru tær í 44 prosent minni vanda fyri at fáa bróstkrabba.

### Smáar nøgdir gera mun

Ulrika Ericson, kanningarleiðari, vísir á, at tað ikki er neyðugt at eta nógva folsýru, fyri at tað skal muna.

- Tað er nóg mikið at leggja kostvanarnar um til meira frukt og grønt. Um tað ikki ber til, mælir hon til kostískoyti.

Í USA, Onglandi og Canada verður mjølið ríkað við folsýru. Svensku myndugleikarnir umhugsa eisini at ríkað mjølið við folsýru, og har verður longu nú mælt til at kvinnur í barnførum aldri eta eyka folsýru ella mat við B-vitamin.

Eitt annað, sum kanningin staðfesti var, at bert ein fimtingur av øllum kvinnunum eta nóg nógvan mat við folsýru, sum eitt nú er at finna í bønum, grønum vøkstri og í fullkornsbreyði.